## Misnøgd við kanning

Avvarandi hjá teimum, sum doyðu, tá eitt flogfar hjá Air France datt niður á veg úr París til Brasil fyri næstan einum hálvum ári síðani, eru ikki nøgd við kanningina, sum skal staðfesta orsøkina til vanlukkuna. Ein talsmaður fyri tey avvarandi hevur júst havt fund við fronsku skaðanevndina, og hann sigur, at nevndin hevur einki framstig gjørt síðani í juni. Tey avvarandi hava illgruna um, at skaðanevndin veit meiri, enn hon vil siga, og tey vilja eisini vera við, at teir fronsku myndugleikarnir royna at verja Air France. Eitt ávegisúslit av vanlukkukanningini kemur ætlandi seinni í hesari vikuni.



## Umval í Kili

Forsetavalið í Kili í gjár gav einki endaligt úrslit, tí einki av valevnunum fekk tey kravdu 50 prosentini. Sambært valnevndini fekk tann konservativi ríkmaðurin Sebastian Pinera 45 prosent av atkvøðunum, og fyrrverandi forsetin Eduardo Frei fekk 32 prosent, og teir báðir skulu so kappast í seinna valumfari, sum verður tann 17. januar. Vinnur Sebastian Pinera valið tá, verður hann tann fyrsti borgarligi forsetin í Kili síðani einaræðistíðina. Verandi kilski forsetin, Michelle Bachelet, er sera væl umtókt, men kann ikki stilla uppaftur, tí eftir lógini kann forsetin bara sita eitt valskeið.



*Fólk í listaumhvørvinum undra seg yvir innkeypspolitikkin hjá Listasavni Føroya*

# Vandi fyri holi í listasøguni

**Ongin tykist vita, hví Listasavn Føroya bert hevur keypt heilt fá verk frá listafólkum í Heystframsýningarbólkinum seinnu árini. - Eitt slíkt hol í føroysku listasøguni kann fáa álvarsligar avleiðingar, sigur forkvinnan í bólkinum. Leiðarin á Listasavninum noktar at úttala seg til Sosialin**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Eg eri ikki interesseraður í at tosa við tykkum«

Tað var svarið, vit fingu frá Helga Fossadal, leiðara á Listasavni Føroya, tá vit fríggjadagin royndu at fáa greiðu á, hví bert 10 av teimum 122 listaverkunum, sum Listasavnið keypti inn frá 2005 til 2008, eru frá listafólkum, sum vóru limir í Heystframsýningarbólkinum hetta tíðarskeiðið. Hetta hóast bólkurin hesi árini taldi tey flestu av virknastu føroysku yrkislistafólkunum.

Tølini stava frá ársfrágreiðingunum hjá Listasavni Føroya hetta tíðarskeiðið, har tað til dømis eisini sæst, at onki verk varð keypt frá hesum listafólkunum í fjør, tá Listasavnið annars keypti 53 verk frá øðrum listafólkum.

### Vandi fyri skeivari mynd

Ein av teimum, sum undrar seg stórliga yvir innkeypspolitikkin hjá Listasavni Føroya, er Hansina Iversen, forkvinna í Heystframsýningarbólkinum. Hon vísir á, at havandi í huga, at ein tann fremsta uppgávan hjá Listasavninum er at endurspegla og fortelja føroysku myndlistasøguna, kunnu fáu keypini frá einum stórum bólki av listafólkum fáa sera álvarsligar avleiðingar. Serliga tí føroyska myndlistaumhvørvið er lítið frammanundan.

- Úrslitið er longu nú, at eitt stórt hol er í samlingini hjá Listasavninum. Um hetta holið ikki verður bøtt skjótast, endar tað við, at vit fáa eina fullkomiliga skeiva og misvísandi mynd av føroyskari myndlistasøgu, ávarar hon.

Fyri at fáa greiðu á, hví so fá verk hjá Heystframsýningarbólkinum eru at síggja á keypslistanum hjá Listasavninum, vildu vit fegin spurt leiðaran á Listasavninum, Helga Fossadal, hvørjar treytir og listarlig kriteriu hava gjørt seg galdandi í sambandi við listakeypini hetta tíðarskeiðið. Vit vildu eisini fegin hoyrt hansara viðmerking til vandan fyri, at eftirtíðin fær eina misvísandi mynd av føroyskari myndlistasøgu.

Men Helgi Fossadal er »ikki interesseraður í« at tosa við Sosialin, sum hann málbar seg í telefonini.

Heldur ikki formaðurin í stýrinum fyri Føroya Listasavn, Martin Næs, kann varpa ljós á spurningin um, hví Heystframsýningarbólkurin er so lítið umboðaður millum keypini hjá Listasavninum.

- Tað veit eg ikki, sigur Martin Næs og vísir til leiðaran Helga Fossadal.

### Má fáast í rættlag

Júst hvar ábyrgdin fyri virksemið á Listasavni Føroya liggur er heldur ógreitt, tí stovnurin bæði er sjálvsognarstovur, samstundis sum Mentamálaráðið játtar Listasavninum út við 2,5 almennar milliónir um árið. Hartil er tað Mentamálaráðið, sum velur formannin fyri stýrið á savninum.

Tí vendu vit okkum til mentamálaráðharran, Helenu Dam á Neystabø, við spurninginum um, hví bara 10 av 122 listaverkum, sum Listasavnið keypti árini 2005-2008 eru frá listafólkum í Heystframsýningarbólkinum.

- Hasum veit eg ikki av. Hatta ljóðar ikki gott, tí tað má sjálvandi ikki ganga út yvir nakað listafólk, at summi í umhvørvinum hava ilt við at semjast, sigur Helena Dam á Neystabø og sipar til, at síðani 2005 hava flestu av limunum í Heystframsýningarbólkinum noktað at sýna fram á Listasavninum, tí tey kunnu ikki góðtaka, at leiðarin á savninum ikki hevur listafakliga útbúgving .

Sum kunnugt verður í løtuni arbeitt við at skipa Listasavn Føroya undir einum Tjóðsavni. Í uppritinum fyri Tjóðsavni skrivar Mentamálaráðið millum annað, at »Tað grundleggjandi í savnsshugsjónini er at fyriskipa langtíðarminni samfelagsins«.

Spurd um vandi ikki er fyri, at listarligu keypini á Listasavninum fara at skapa eitt hol í okkara myndlistaraliga minni, sigur mentamálaráðharrin

- Skeivleikar í listarligu umboðani eiga í øllum førum ikki at koma fyri. Um tað er hent, má tað fáast í rættlag, so hatta má eg kanna nærri.

Um listaliga umboðanin á Listasavninum er broytt síðani 2008 vita vit ikki, tí tað hevur ikki borið til, at fáa leiðsluna á savninum at vísa okkum keypslistan fyri 2009, sum hann sær út higartil.